# Viðtøkur fyri áhugafelagsskapin Sluppvinir

§ 1.
Einstaklingar, feløg og felagskapir kunnu gerast limir í áhugabólkinum.

§ 2.
Virknir limir: Hetta eru limir, sum verða við í dagliga rakstrinum.
Óvirknir limir: Hetta eru limir, sum ikki taka lut í tí dagliga rakstrinum, men hava áhuga í at stuðla peningaliga við einum árligum limagjaldi.

§ 3.
Árliga limagjaldið er kr. 200 fyri virknar limir, kr. 400 fyri óvirknar limir og kr. 1.000 fyri feløg.
Limagjaldið skal verða goldið innan 1. apríl.

§ 4.
Teir virknu limirnir hava ein virknan lut í viðlíkahaldinum av Westward Ho og manna, eftir nærri avtalu og førleika, sluppina í summarhálvuni, ella taka á annan hátt lut í rakstrinum gjøgnum árið.

§ 5.
Virknir limir: Gevur rætt til luttøku á serstøkum túrum fyri limir. Framíhjárætt til luttøku á møguligum túrum uttanlands.
Óvirknir limir: Kunning um virksemið hjá Westward Ho og luttøku í møguligum tiltøkum fyri óvirknar limir.

§ 6.
Nevndin fyri Westward Ho skipar fyri í minsta lagi einum árligum limafundi.

§ 7.
Um limur er í eftirstøðu í limagjaldi, kann limaskapurin verða strikaður.

Soleiðis samtykt av nevndini fyri Westward Ho tann 22. juni 2005.